# Alonso verður heimsmeistari í formel 1

**Fernando Alonso so gott sum tryggjaði sær heimsmeistaraheitið í formel 1 á breytini í Hockenheim sunnudagin. Enn er ein matematiskur møguleiki, at hann ikki gerst meistari, men við 36 stigum niður til Raikkonen, verður fyrsti spanski heimsmeistarin í formel 1 skjótt veruleiki.**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Koyringin gjørdist sera spennandi og hendingarík, við yvirhálingum og samanstoytum og nøkrum frálíkum einstaklinga avrikum. Í byrjanini helt Raikkonen fyrstu byrjunarstøðu, Alonso fór av triðja upp á annað pláss, Michael Schumacher fór av fimta upp á triðja pláss, og Montoya, sum koyrdi útav í tíðarkoyringini og tí byrjaði næst aftastur, koyrdi av nítjunda plássi upp á annað pláss.

Jenson Button, sum byrjaði á øðrum plássi, datt niður á fjórða pláss í sjálvari byrjanini, men megnaði at taka annað pláss frá Michael Schumacher, aftan á at hava stríðst við týskaran í 15 umferðir. Hann misti tó annað pláss aftur til Montoya, tá hesin koyrdi í pitt væl seinni enn Button. Men eitt triðja pláss, aftan á eitt fimta og eitt fjórða pláss í teimum báðum seinastu koyringunum, vísir, at BAR er við aftur har, sum tað er stuttligt.

### Óhepni Kimi

McLaren-Mercedes bilurin við Kimi Raikkonen var fremstur inntil 35 umferðir vóru koyrdar, og hann lá trygt eini 10 sekund frammmanfyri Alonso. Tað sá leingi út, sum um eitt lítið sindur av spenningi fór at vera varveittur. Men á 35 umferðini gav McLaren-Mecedes bilurin hjá Raikkonen enn einaferð upp anda, og liði smitaði ein tryggan sigur beint í favnin á unga spaniumanninum.

Hetta legði Michael Schumacher á eitt annað pláss, men hann fekk um sama mundið trupulleikar við dekkunum, og datt í endaðum av einum øðrum til eitt fimta pláss. Hann liggur sostatt 40 stig aftan fyri Alonso, og sjálvt ikki ein sjeyfaldur heimsmeistari kann megna at vinna hesi stigini inn aftur.

### Montoya dagsins maður

Juan Pablo Montoya, vísti at hann er aftur í toppform, tá hann koyrdi av næstseinastu byrjunarstøðu upp á eitt annað pláss. Longu í sjálvari byrjanini fór kolumbiumaðurin av nítjundu byrjunarstøðu upp á ellinta pláss. Aftan á 27 umferðir var bilurin hjá Montoya seinasti bilur at fara í pit, og í pitstoppinum fór Montoya upp á fimta pláss. Tá vóru bert Button, eldri Schumacher beiggin, Alonso og Raikkonen frammanfyri hann. Raikkonen steðgaði upp, og Schumacher og Button vórðu yvirhálaðir í næsta pitstoppi. Tá var longu ov langt upp til Alonso, so Montoya noyddist at taka til takkar við næststørsta steypinum.

### Villeneuve í trimum samanstoytum

Jaques Villeneuve hevði eina heilt øðiliga hendingaríka formel 1 renning, longu á fyrstu umferðini rendi Barrichello á hann, eina løtu seinni rendu hann og nýggi maðurin í Minardi Robert Doornbos saman og báðir skaddu sær bilin. Men fyri at gera dagin uppaftur verri koyrdi Tiago Monteiro beint inn í bilin hjá Villeneuve, tá Villeneuve var komin hálvan vegin framvið Jordan bilinum, kanning varð sett í verk, og Monteiro fær ivaleyst onkra revsing. Bilurin hjá Villeneuve fór illa, og øll gronin varð skift út. Allir hesir trupulleikar kostaðu Villeneuve nøgva tíð. Hann endaði tríggjar umferðir aftan fyri Alonso á einum fimtanda plássi.

### Býtt tíðarrevsing

Robert Doornbos koyrdi sína fyrstu koyring fyri Minardi, og liðið sveik unga hálendingin illa. Tá hann á fjórðu umferð rendi saman við Villeneuve punkteraði hann. Tá hann fór í pit, at skifta dekk, varð samstundis bensin fylt á bilin. Hetta er ikki loyvt sambært reglugerðini. Hann fekk tí eina tíðarrevsing.

Takuma Sato hevði ikki heimsins bestu eydnu. Í fyrsta svingið rendi japanski BAR koyrarin á Mark Webber, og beint aftaná rendi hann í reyvina á bilinum hjá Fisichella, og noyddist at skifta gronina á bilinum. Bilurin hjá Webber var so illa farin, at Webber fór í pit í 12 umfør. Men koyrdi síðan víðari.




*Fernando Alonso verður um stutta tíð heimsmeistari í Formel 1*

*Mynd: Reuters*

| Nr. | Koyrari | Bilslag | Tíð | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Fernando Alonso | Renault | 1:26:28.599 | 10 |
| 2. | Juan Pablo Montoya | McLaren-Mercedes | +22.5 secs | 8 |
| 3. | Jenson Button | BAR- Honda | +24.4 secs | 6 |
| 4. | Giancarlo Fisichella | Renault | +50.5 secs | 5 |
| 5. | Michael Schumacher | Ferrari | +51.6 secs | 4 |
| 6. | Ralf Schumacher | Toyota | +52.2 secs | 3 |
| 7. | David Coulthard | Red Bull Racing | +52.7 secs | 2 |
| 8. | Felipe Massa | Sauber-Petronas | +56.5 secs | 1 |
| 9. | Christian Klien | Red Bull Racing | +69.8 secs | |
| 10. | Rubens Barrichello | Ferrari | +1 umferð | |
| 11. | Nick Heidfeld | Williams-BMW | +1 umferð | |
| 12. | Takuma Sato | British American Racing Honda | +1 umferð | |
| 13. | Christijan Albers | Minardi-Cosworth | +2 umferðir | |
| 14. | Jarno Trulli | Toyota | +3 umferðir | |
| 15. | Jacques Villeneuve | Sauber-Petronas | +3 umferðir | |
| 16. | Narain Karthikeyan | Jordan-Toyota | +3 umferðir | |
| 17. | Tiago Monteiro | Jordan-Toyota | +3 umferðir | |
| 18. | Robert Doornbos | Minardi-Cosworth | +4 umferðir | |
| 19. | Mark Webber | Williams-BMW | +12 umferðir | |
| 20. | Kimi Räikkönen | McLaren-Mercedes | givin | |

### HM fyri koyararar

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | 87 |
| 2 | Kimi Raikkonen | 51 |
| 3 | Michael Schumacher | 47 |
| 6 | Juan-Pablo Montoya | 34 |
| 4 | Jarno Trulli | 31 |
| 5 | Rubens Barrichello | 31 |
| 8 | Giancarlo Fisichella | 30 |
| 9 | Ralf Schumacher | 26 |
| 7 | Nick Heidfeld | 25 |
| 10 | Mark Webber | 22 |

### HM fyri lið

| | |
|---|---|
| Renault F1 | 117 |
| McLaren-Mercedes | 95 |
| Scuderia Ferrari | 78 |
| Toyota Racing | 54 |
| BMW WilliamsF1 | 47 |
| Red Bull Cosworth | 24 |
| BAR Honda | 15 |
| Sauber Petronas | 14 |
| Jordan Toyota | 14 |
| Minardi Cosworth | 7 |